## Finnar vilja ikki verja Ísland

Síðani amerikanska flogvápnið tók síni jagaraflogfør úr Íslandi, hava flogfør hjá ymsum londum átikið sær at hava eftirlit við íslendska loftrúminum. Eitt nú hava flogfør úr Danmark, Fraklandi og USA røkt uppgávuna, og í hesum mánaðinum taka norsk flogfør við. Ætlanin hevur verið, at Norðurlond skulu átaka sær eftirlitsuppgávuna, men hesum vil Finnland ikki taka lut í. Finski verjumálaráðharrin, Jyri Häkämies, segði við blaðið Turun Sanomat í gjár, at tað hevði verið ov kostnaðarmikið fyri Finnland at røkt eftirlitið saman við hinum Norðurlondunum. Tí verður Finnland ikki við, segði hann.



## Vevmyndatól í allar skúlar

Royndir í donskum býum vísa, at skular, sum hava vevmyndatól í skúlagarðinum, hava færri trupulleikar enn aðrir skúlar, og nú hava teir kommunalu myndugleikarnir í Esbjerg gjørt av, at har skulu allir skúlar hava vevmyndatók í skúlagarðinum. Tað skrivar JydskeVestkysten. Birthe Christiansen, sum er skrivstovustjóri í skúlaumsitingini í Esbjerg, sigur, at tíggju av skúlunum í kommunui hava vevmyndatól uttanfyri, og at har hava verið munandi færri herverk, síðani tólini komu. Tað fer at kosta Esbjerg kommunu fýra milliónir krónur at seta vevmyndatól í allar skúlagarðarnar.

# Ógvusligar spreingingar við Karlamagnusarbreyt

**Hósdagin var eitt óhapp í samband við spreingiarbeiði við Karlamagnusarbreyt. Spreingimátturnar vardu ikki nóg væl, og smágrót regnaði oman yvir grasvøll og húsatekjur nærhendis. Arbeiðseftirlitið hevur kannað málið**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*Myndir: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*




*Spreingiarbeiðið við Karlamagnusarbreyt varð steðgað og løgreglan boðsend, tá tað eftir eina spreinging regnaði við smágróti omanyvir húsini nærhendis*

Hósdagin klokkan 11.30 fekk løgreglan eina fráboðan um spreingiarbeiði til ampa við Karlamagnusarbreyt.

Í samband við byggiarbeiði á staðnum, hevur fyritøkan Guttesen & Staksberg sprongt har seinastu dagarnar. Hósdagin varð arbeiðið tó steðgað, tá alt ikki var, sum tað skuldi.

Tætt er millum økið, har sprongt verður, og húsini, og tá sprongt varð stutt fyri døgurða hósdagin, hendi tað óhapp, at leyst grót varð slongt út millum spreingimátturnar, ið skulu verja fyri, og omanyvir grasplenu, har børn plaga at spæla og húsatekjur.

Lukkutíð vóru eingi børn har á leiðini, tá sprongt varð.

### Sprongdu eftir forskriftunum

Arbeiðseftirlitið kom á staðið, og fór beint undir kanningararbeiðið. Sofus Poulsen, verkfrøðingur, hevur ábyrgdina hjá Arbeiðseftirlitinum á økinum við spreingiarbeiði og spreingievnum.

- Tað er einki sum bendir á, at teir hava vikið frá teimum forskriftum, ið galda á økinum. Alt svaraði til forskriftirnar, og tað er ikki ávísiligt at nakað skeivt er farið fram, greiðir Sofus Poulsen frá.

- Talan er eitt óhapp, sum ikki skal henda, men sum kemur fyri. Spreingimeistarin hevur fingið loyvi at halda fram, men fer helst at skerpa trygdina og taka neyðugu stigini til at tryggja at hetta ikki hendir aftur, sigur Sofus Poulsen, verkfrøðingur á Arbeiðseftirlitinum.

## Húsaeigari bjargaður úr eldsbruna

**Ein húsaeigari í Havn kann takka árvaknum grannum og sløkkiliðinum fyri, at hann enn er á lívi. Eldur kom í, og hann lá í stovuni og svav**

112
*Rigmor Dam/Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Stutt fyri døgurða í gjár, sunnudagin, var eldur í einum húsum í Krossgøtu 2 í Havn. Klokkan 11.19 fekk løgreglan fráboðanina um eldsbrunan, tá fólk í grannalagnum sóu royk koma út úr tekjuni.

Nógvur roykur var í húsinum, tá sløkkiliðið kom á staðið, og inni í stovuni varð komið fram á eigaran, sum lá og svav í sofuni. Hann var bjargaður út í øllum góðum.

Sløkkiliðið fekk skjótt tamarhald á eldinum, sum tíbetur ikki fekk tíð at breiða seg til aðrar partar av húsinum, har nøkur leigumál eru. Tó er nakað av vatn- og roykskaða.

Eldurin er helst kyknaður á vesinum, møguliga í einari stikkdós, har fleiri eltól og lampur sótu í.



*Sløkkiliðið var skjótt á staðnum, og í stovuni komu teir fram á eigaran, sum lá á sofuni og svav. Hann kann takk árvaknum grannum og sløkkiliðinum fyri at hann er á lívi*

*Mynd: Rigmor Dam*

# Bardagamenn í brennivíni

**Løgreglan hevur fleiri ferðir verið úti til ófrið um vikuskiftið. Eitt harðskapsmál er skrásett, og løgreglan hevur fleiri ferðir verið úti og sissað, har lagt var upp til rok**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tá fólk, og kanska serliga menn, eru í býnum, dámar teimum eftir øllum at døma ógvuliga væl at berjast. Í øllum førum, hevur løgreglan fleiri ferðir verið úti um vikuskiftið og sissað partarnar, tá lagt hevur verið upp til rok.

Leygarnáttina um klokkan 4 fekk løgreglan eina fráboðan um harðskap í Havnargøtu, eisini kallað við Røntguna, í Havn. Ein persónur er álopin, og hevur fingið skaðar á høvdið. Løgreglan kemur á staðið, og álopni maðurin varð innlagdur á Landssjúkrahúsið til kanningar.

Tað vísir seg tá sum at maðurin hevur brotið eitt kjálkabein og møguliga okkurt annað eisini av snuddunum, hann hevur fingið.

Ein maður er handtikin í hesum máli, og er skuldsettur fyri harðskap.

### Húsaófriður og rok

Vakthavandi á Løgreglustøðini í Havn greiðir frá, at teir fleiri ferðir hava verið úti og koyrt um vikuskiftið.

- Eini fýra til fimm ferðirnar sunnunáttina vóru vit úti og máttu sissa partarnar, tá lagt var upp til rok, greiðir vakthavandi frá.

Eisini var løgreglan boðsend til ein húsaófrið, har ein dempari mátti leggjast á støðuna.